# Fíggjarmálaráðið

**Løgtingið**

| | |
|---|---|
| Dagfesting: | 28.10.2019 |
| Mál nr.: | 19/00372 |
| Málsviðgjørt: | TM/HKV |
| Eftirkannað: | 23.10.2019 |

**Løgtingsmál nr. 20/2019: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um áseting av skatti (Ásetingarlógin)** (Skattafrádráttur á kr. 6.000 um árið til fólkapensjónistar)

**Uppskot til**

**Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um áseting av skatti (Ásetingarlógin)**
(Skattafrádráttur á kr. 6.000 um árið til fólkapensjónistar)

**§ 1**

Í løgtingslóg nr. 87 frá 1. september 1983 um áseting av skatti (Ásetingarlógin), sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 181 frá 21. desember 2018, verður § 3, stk.4 orðað soleiðis:
"*Stk. 4.* Hvør persónur, sum fær fólkapensjón, sambært lóg um almannapensjónir o.a., fær í útroknaða landsskattinum ein landsskattafrádrátt og í útroknaða kommunuskattinum ein kommunuskattafrádrátt. Í 2020 er landsskattafrádrátturin upp til 1.500 kr. um árið, og kommunuskattafrádrátturin er upp til 1.500 kr. um árið. Í 2021 og fylgjandi ár er landsskattafrádrátturin upp til 3.000 kr. um árið, og kommunuskattafrádrátturin er upp til 3.000 kr. um árið."

**§ 2**

Henda løgtingslóg kemur í gildi 1. januar 2020.

## Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

### 1.1. Orsakir til uppskotið
Nýggja samgongan hevur sett sær sum mál, at allir fólkapensjónistar skulu fáa munandi meira at liva av.

Hetta uppskotið er ein partur av einum lógarpakka, sum umfatar 3 uppskot.

Mælt verður til hesar broytingar:
1. Mótrokningin í fólkapensjónini verður gjørd meira lagalig.
2. Grunduppphæddin hækkar við 580 kr. um mánaðin.
3. Fólkapensjónistar fáa ein serligan skattafrádrátt.

Broyting nr. 1 og nr. 2 verða framdar í almannalóggávu, meðan broyting nr. 3 verður framd við hesum uppskotinum.

### 1.2. Galdandi lóggáva
Fólkapensjónistar hava ongan serligan skattafrádrátt í galdandi skattalóggávu. Men av teimum veitingum, sum fólkapensjónistar fáa, eru summar skattafríar og aðrar skattskyldugar. Útgjald úr AMEG og viðbótin til fólkapensjónina eru skattskyldug inntøka, meðan grundupphæddin og brennistuðulin (viðbót til ávísar pensjónistar) eru skattafrí.

Sambært §3 í ásetingarlógini hava fyritíðarpensjónistar ein frádrátt í skattinum. Fólkapensjónistar hava fyrr havt henda frádrátt, men tá grundupphæddin varð gjørd skattafrí, varð frádrátturin tikin burtur. Men frádrátturin er tó framvegis galdandi fyri tey, sum eru 67 ár og eldri, og sum ikki fáa fólkapensjón.

## 1.3. Endamálið við uppskotinum

Mælt verður nú til, at øll, sum fáa fólkapensjón, fáa ein serligan frádrátt í skattinum á 6.000 kr. árliga. Harav verður 3.000 kr. árliga drigið frá í landsskattinum og 3.000 kr. árliga í kommunuskattinum.

Ætlanin er, at frádrátturin verður settur í verk í tveimum stigum, soleiðis at helvtin av frádráttinum verður settur í gildi í 2020, og restin í 2021.

Tað fer at hava við sær, at fólkapensjónistar fara at rinda 3.000 kr. minni í skatti í 2020 og 6.000 kr. minni í 2021 og frameftir.

Tað vil siga, at fólkapensjónistar fara at fáa 250 kr. meira útgoldið um mánaðin í 2020 og 500 kr. í 2021 og árini frameftir.

Ásett er, at talan er um "upp til 3.000 kr." og "upp til 3.000 kr.". Tað vil siga, at er lands- ella kommunuskatturin minni enn frádrátturin., verður frádrátturin tað lægri. Tað vil siga, at óbrúktur frádráttur verður ikki útgoldin. Men øll, sum fáa fulla fólkapensjón og fult útgjald úr AMEG, rinda nóg mikið av bæði lands- og kommunuskatti til, at tey fáa fult gagn av frádráttinum.

Hjá teimum, ið fáa niðursetta pensjón ella niðursett útgjald úr AMEG, og sum ikki hava nakra aðra skattskyldugara inntøku, kann tó koma fyri, at tað ikki er nóg mikið av skatti at draga frá.

Í teimum førum, har hjúnafelagar verða mótroknaðir saman, og annar hjúnafelagin hevur eina munandi inntøku afturat pensjónini, og hin hjúnafelagin onga inntøku hevur uttan fólkapensjón og AMEG kann tað eisini koma fyri at tann við ongari inntøku ikki fer at hava nóg mikið av landsskatti til allan frádráttin. Men frá 1. januar 2020 ber til hjá øllum at velja at verða mótroknað hvør sær, og tað hevur við sær, at tann við ongari inntøku kann varðveita sína viðbót, og so er nóg mikið av skatti til at draga frá.

## 1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum

Uppskotið hevur við sær at tey, sum fáa fólkapensjón, fáa ein skattafrádrátt á samanlagt 3.000 kr. árliga í 2020. Av hesum verða 1.500 kr. latnar í landsskattinum og 1.500 kr. í kommunuskattinum.

Í 2021 og árini frameftir hækkar frádrátturin upp í 6.000 kr. árliga. Av hesum verða 3.000 kr. latnar í landsskattinum og 3.000 kr. í kommunuskattinum.

Uppskotið tryggjar teimum, sum fáa fólkapensjón ein skattalætta á 500 kr. um mánaðin frá 2021. Í 2020 verður tó talan um 250 kr. um mánaðin.

## 1.5. Ummæli og ummælisskjal

Vegna stutt skotbrá hevur uppskotið ikki verið til hoyringar innan framløgu.

Uppskotið er sent til hoyringar, samstundis sum uppskotið varð framlagt, og hoyringarsvar verða send Løgtinginum til kunningar.

## Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

### 2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Uppskotið hevur fíggjarligar avleiðingar fyri landið og kommunurnar.

Uppskotið hevur við sær, at umleið 8.000 fólkapensjónistar fara at rinda 3.000 kr. minni í skatti í 2020, og 6.000 kr. minni í 2021 og árini frameftir.

Roknað verður tí við, at skattainntøkurnar hjá landskassanum minka við umleið 12 mió. kr. í 2020, og inntøkurnar hjá kommununum minka somuleiðis við umleið 12 mió. kr. í 2020.

Í 2021 verður roknað við, at kostnaðurin tvífaldast upp í 24 mió. kr. fyri landskassan og somuleiðis 24 mió. kr. fyri kommunurnar.

### 2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Uppskotið hevur umsitingarligar avleiðingar fyri TAKS, sum skal umsita skattafrádráttin. Roknað verður við, at tað kostar umleið 310 tús. kr. at tillaga KT-skipanina til frádráttin.

### 2.3. Avleiðingar fyri vinnuna

Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri vinnuna.

### 2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið

Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri umhvørvið.

### 2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum

Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

### 2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir

Uppskotið hevur jaligar fíggjarligar avleiðingar fyri fólkapensjónistar.

### 2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum

Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri millumtjóðasáttmálar á økinum

### 2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar

Uppskotið hevur ikki avleiðingar fyri tvørgangandi millumtjóðasáttmálar.

### 2.9. Markaforðingar

Uppskotið kann hava við sær markaforðingar. Tað er soleiðis, at fólkapensjónistar, sum búseta seg uttan fyri danska ríkið, kunnu taka føroysku fólkapensjónina við sær. Men tey, sum hava bústað uttan fyri Føroyar, kunnu ikki fáa gagn av einum føroyskum skattafrádrátti, tí tey eru ikki fult skattskyldug í Føroyum.

Tað hevur við sær, at fólkapensjónistar, ið flyta til lond uttan fyri danska ríkið, fáa ikki frádráttin við sær, og tað kann verða eitt slag av markaforðing.

Tað búgva í løtuni 237 persónar uttan fyri ríkið, ið fáa føroyska fólkapensjón, og tey fáa, sum sagt, ikki fyrimun av frádráttunum í hesum uppskotinum.

Fyri pensjónistar ið flyta innan fyri ríkið, til Grønlands ella Danmarkar, er ongin ávirkan, tí hesi taka ikki føroysku fólkapensjónina við sær, tey fáa í staðin grønlendska ella danska pensjón.

### 2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv
Uppskotið hevur ikki ásetingar um revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv.

### 2.11. Skattir og avgjøld
Uppskotið lækkar skattin hjá fólkapensjónistum við 3.000 kr. árliga í 2020 og 6.000 kr. árliga í 2021 og árini frameftir.

### 2.12. Gjøld
Uppskotið hevur ikki ásetingar um gjøld.

### 2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?
Uppskotið áleggur ikki likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur

### 2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?
Uppskotið Leggur ikki heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur.

### 2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?
Uppskotið gevur ikki almennum myndugleikum atgongd til privata ogn.

### 2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?
Uppskotið hevur ikki aðrar avleiðingar.

### 2.17. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum

| | Fyri landið ella landsmyndug-leikar | Fyri kommunalar myndugleikar | Fyri pláss ella øki í landinum | Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar | Ja | Ja | Nei | Ja | Nei |
| Umsitingarligar avleiðingar | Ja | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Umhvørvisligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Sosialar avleiðingar | | | Nei | Ja | |

**Kapittul 3. Serligar viðmerkingar**

**3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina**

**Til § 1**

**Nr. 1**
Tað verður ásett, at øll, sum fáa fólkapensjón, fáa ein frádrátt í skattinum á tilsamans 3.000 kr. um árið í 2020. Harav verða 1.500 kr. drignar frá í landsskattinum og 1.500 kr. frá í kommunuskattinum. Hetta hevur við sær, at fólkapensjónistar í 2020 fara at rinda 1.500 kr. minni í landsskatti, og somuleiðis 1.500 kr. minni í kommunuskatti.

Eisini verður ásett, at øll, sum fáa fólkapensjón, fáa ein frádrátt í skattinum á tilsamans 6.000 kr. um árið í 2021 og árini frameftir. Harav verða 3.000 kr. drignar frá landsskattinum og 3.000 kr. frá kommunuskattinum. Hetta hevur við sær, at fólkapensjónistar frá 2021 og frameftir fara at rinda 3.000 kr. minni í landsskatti, og somuleiðis 3.000 kr. minni í kommunuskatti.

Ásett er at talan er um persónar, ið fáa fólkapensjón sambært lóg um almannapensjónir (løgtingslóg nr. 48 frá 10. Mai 1999 um almannapensjónir o.a.). Tað vil siga, at talan skal verða um føroyska fólkapensjón. Persónar, ið einans fáa útlendska fólkapensjón eru sostatt ikki fevndir.

Tað finnast eisini dømir um persónar, ið fáa fólkapensjón lutvíst úr Føroyum og lutvíst úr øðrum landi. Hesi eru tó fevnd av frádráttinum. Tað vil siga, at tey fáa fullan frádrátt.

Ásett er, at talan er um "upp til 1.500 kr.", og "upp til 3.000 kr.". Tað vil siga, at er lands- ella kommunuskatturin minni enn frádrátturin, verður frádrátturin tað lægri. Tað vil siga, at óbrúktur frádráttur verður ikki útgoldin. Men hjá øllum sum fáa fulla fólkapensjón og fult útgjald úr AMEG, skuldi verið ríkiligt av bæði lands- og kommunuskatti til frádráttin.

Hjá teimum, ið fáa niðursetta pensjón ella niðursett útgjald úr AMEG, og sum ikki hava nakað av aðrari skattskyldugari inntøku, kann tó koma fyri, at tað ikki er nóg mikið av skatti at draga frá.

Í teimum førum, har hjúnafelagar verða mótroknaðir saman, og annar hjúnafelagin hevur eina munandi inntøku afturat pensjónini, og hin hjúnafelagin onga inntøku hevur uttan fólkapensjón og AMEG kann tað eisini koma fyri at tann við ongari inntøku ikki fer at hava nóg mikið av landsskatti til allan frádráttin. Men frá 1. januar 2020 ber til hjá øllum at velja at verða mótroknað hvør sær, og tað hevur við sær, at tann við ongari inntøku kann varðveita sína viðbót, og so er ríkiligt av skatti til at draga frá.

**Til § 2**
Áseting um gildiskomu.

Fíggjarmálaráðið, 28. oktober 2019

**Jørgen Niclasen**
landsstýrismaður

/ Bjarni Askham Bjarnason

**Yvirlit yvir fylgiskjøl:**
Fylgiskjal 1: Javntekstur